# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Trý eru hyggjuráðini

Tað var Tony Blair, sum á sinni segði, at Bretlandi tørvar trý ting: útbúgving, útbúgving og útbúgving, um landinum skuldi standa til bata. Hesi orð hava nógvir nútímans politiskir leiðarar úr sera ymiskum flokkum gjørt til síni, og hesi orð hava ikki so lítið at gera við tað evnið, ið vit umrøddu í hesum teigi í gjár. Vit vístu á ein vaksandi trupulleika innan almenna sektorin nevniliga, at starvsfólk tykjast ikki at vera nøgd við arbeiðsviðurskifti og kringsumstøður sum heild. Vit nevndu støðuna á Landssjúkrahúsinum, og vit kundu eins væl víst á, at støðan tykist lítið mætari í fólkaskúlanum.

Vit vístu í gjár á nøkur grundleggjandi viðurskifti, sum ikki eru í lagi og nevndu í tí sambandi, at vit vildu venda aftur til spurningin um útbúgving. Nú fer veruliga at hasta við einum samlaðum og visjonerum útbúgvingarpolitikki. Vit vita, at tað stendur ikki væl til í fólkaskúlanum, vit vita, at miðnámsøkinum tørvar ábøtur, og vit vita somuleiðis, at tað hevur skund við samskipan av hægri útbúgvingunum. Sum vanligt hevur orðaskiftið verið meira eyðkent av togan um bygnað og staðsetingar enn av spurningum um innihald. Vit mugu nú koma víðari.

Undanfarna samgonga gjørdi eitt dygdargott og stórt arbeiði til tess at bøta um alla undirvísingarskipanina frá dagstovni til universitet. Ein týðandi partur av hesum arbeiði varð lagt í Visjón 2015, har stór almenn orka varð nýtt. Úrslitið var á mangan hátt sera áhugavert, sum ikki er so løgið, eftir sum nakrir av landsins bestu heilum vóru millum høvundarnar. Tað vildi verið burturvið ikki at nýtt alt hetta tilfar og tey tilmæli, sum liggja í visjónstilfarinum. Tað eru ikki stundir at gera alt hetta arbeiðið umaftur, og tí eigur samgongan at halda fram við tí arbeiði, sum undanfarna samgonga legði til rættis. At landsstýriskvinnan í útbúgvingarmálum sleppur at seta síni egnu fingramerki á útbúgvingarpolitikkin er sjálvsagt, men vit kunnu ikki bíða fýra ár eftir einum nýggjum útspæli. Tað er tí eitt at gera, og tað er at taka táttin upp aftur og gera setningin lidnan. Í altjóðagerðini eru bert tey trý hyggjuráðini: útbúgving, útbúgving og útbúgving.

**Sosialurin**

## Er okkara fíggjarmálaráðharri stuttmintur?

REGIN EIKHÓLM



Tá fíggjarmálaráðharrin, Kartin Hansen, í sjónvarpinum herfyri ákærdi danir fyri ikki at hava gjørt nakað munagott fyri at ávara føroysku mynduleikarnar um skeivu fíggjargongdini í Føroyum í 80 – árunum, sum førdi til fíggjarkreppuna í 90 – unum, so tosar hann móti betri vitandi, ella er hann dekan og stuttmintur?

Tað má vera eitt minstakrav, at okkara fíggjarmálaráðharri er kunnugur við tað, sum stendur í "Frágreiðing um 80-árini ", sum Føroya Løgting § 19-nevndin gav út í 2000. Eitt megnarverk uppá 443 síður við hópin av upplýsingum um eitt dapurt tíðarskeið í okkara politisku søgu.

**Ráðgevandi Nevndin**
Á síðu 104 til 107 er stutt umrøða av Ráðgevandi Nevndini (Det rådgivende udvalg vedrørende Færøerne) hjá forsætisráðharranum. Ráðgevandi Nevndin skuldi í neyvum samstarvi við føroyska Búskaparráðið fylgja við fíggjarligu gongdini í Føroyum, og geva forsætisráðharranum eina neyva frágreiðing um gongdina í Føroyum. Á hvørjum ári, eisini í 80-árunum, hevur Ráðgevandi Nevndin givið út bókling um "den økonomiske udvikling på Færøerne".

**Útsagnir frá Ráðgevandi Nevndini**
Á fundi 27. mai 1965 við Landsstýrið og Búskaparráðið, gav formaðurin í Ráðgevandi Nevndini hesa skortfleingju: "De offentlige investeringer er mildest talt for store med de velkendte sidevirkninger".

Í frágreiðingini frá 1980 varð m.a. sagt: "Det er næppe muligt uden nye økonomiske indgreb at få genskabt den fornødne ligevægt på betalingsbalancen....." Ávaringarnar halda fram, og í 1985 stendur m.a. :...der er behov for alvorlige indgreb, ..... . Udviklingen igennem det sidste år har vist, at dette behov består uændret." Í 1989 er tónalagið skert: " Under disse omstændigheder findes der ingen nemme løsninger." Í 1990 skrivar Ráðgevandi Nevndin m.a.: "Den økonomiske krise på Færøerne er blevet uddybet." Nevndin kemur annars í somu frágreiðing við mongum relevantum útgreiningum.

**§19 –nevndin um Ráðgevandi Nevndina**
§19 –nevndin heldur at Ráðgevandi Nevndin var mannað við væl skikkaðum limum, og at tað er undrunarvert, at tað ikki eydnaðist Ráðgevandi Nevndini at sannføra føroyskar politikarar um, hvussu álvarsom støðan var.

Niðurstøðan hjá §19-nevndini er, at politiska fyrisitingin í Føroyum í 70-árunum og í 80-árunum átti at lagt nógv størri dent á ráðini frá donsku serfrøðingunum. Árligu frágreiðingarnar frá "Det Rådgivende udvalg vedrørende Færøerne" vóru í nógv ár einastu ritgerðir um búskaparligu gongdina í Føroym, óheftar av føroyskum partapolitikki og bygdar á fullgott yrkisligt undirstøði.

**Útsagnir frá føroyskum politikarum**
Á fundi við Ráðgevandi Nevndina hava føroysku politikarnir m.a. brúkt hesi orð: 28.05.1980 "Nytårsforsætter", 25.08.1986 "Dómadagstos", 03.08.1987 "Dómadagsprofetiir", 03.05.1988 "Lyseslukkere".

Um nú fíggjarmálaráðharrin av ein ella aðrari orsøk ivast í omanfyristandandi, kann hann antin tosa við sín fyrrverandi floksfelaga Heina O. Heinesen ella sín núverandi floksfelaga Jenis av Rana, tí bæði Heini og Jenis vóru limir §19 nevndini.

**P.S.** Grundin til at føroyingar so skjótt fótaðu sær eftir fíggjarkreppuna í 90-unum var takkað veri multiplu milliarda hjálpini frá dønum, men fyri hetta hava teir higartil bert fingið ótøkk – skil tað hvør ið vil?

## Tjaldur ver vælkomið

Tjaldur ver vælkomið
heima ert tú nú.
Her á hesum oyggjum
vælkomið er tú.
Lítli vakri vinur,
boðar frá um vár,
setist móður – linur
aftur ár um ár.

Klipp frá reyðum nevið
okkum boðar frá,
at nú spretta blómurnar
allar bøi á.
Tá tú reiður byggir,
hagasóljan sær.
Ravn og Mása styggir,
tú langt burt frá tær.

Tjaldur ver vælkomið
her á Føroya land,
set teg bara niður
trygt á hvítan sand.
Syng tín sang um várið,
syng títt fríska lag,
einaferð um árið,
grækarismessudag.

*Valdemar á Løgmansbø*

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.
Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.